# Um Suðuroyarfjørð við Tjaldrinum

*Finnur Johansen*





*Fyrsta føroyska Tjaldrið hjá Skipafelagnum við kaj í Havn ivaleyst í tríatiárunum, longri inni liggur Havhestur, sum Skipafelagið eisini átti*

*Myndina eigur Fornminnissavnið (3350F3182)*

Tá suðringar, sum hövdu verið norðanfjörðs og ferðast, so seint sum fyri einum 30- 40 árum síðani, fóru suður aftur, valdu teir ofta at fara við Tjaldrinum, tí tað var so góður fartur. Tjaldrið, sum rökti siglingina millum Föroyar og København, sigldi eisini til nakrar av störri bygdunum, tí lítil innanoyggjasigling var, og vegasambandið var ikki bara lítið, men eisini vánaligt.

Vanliga sigldi Tjaldrið til Suðuroyar og til Klaksvíkar, men onkuntíð sigldi tað eisini á Kollafjörð, á Vestmanna og vestur í Vágar, tá skipið hevði farm hagar. Henda innanoyggjasigling var ikki bara fyri kríggið, men helt áfram so leingi Tjaldrið sigldi til einaferð fyrst í sjeytiárunum.

Siglt varð fyrst til Suðuroyar. Farið varð av Havnini klokkan trý um náttina, so komið varð á Tvöroyri til arbeiðstíð um morgunin. Av Tvöroyri varð farið suður á Vág og haðani norður á Klaksvík. Siglt varð av Vági í so góðari tíð um náttina, at skipið var á Klaksvík til arbeiðstíð dagin eftir. Men í Klaksvík var ikki sum í Havn, har kajin var liðug í 1929, í Vági, minnist meg rætt í 1825 og á Tvöroyri um somu tíð, har var eingin kaj har norðuri. Tað var so seint í tíðini, at kaj kom í Klaksvík, tað var eftir at eg minnist, um 1936 haldi eg. Á veg úr Vági til Klaksvíkar varð altíð farið á Havnina fyrst fyri at seta suðringar av, ið hövdu valt sær henda góða fartin norður um fjörð.

Hvussu ofta vit soleiðis feraðust við Tjaldrinum, minnist eg ikki, men tað var nakrar ferðir, og tá hövdu vit altíð koyggju. Farið varð umborð á Tjaldrið og í koyggjuna til niðurfaringartíð, og tá tú vaknaði aftur vart tú á Tvöroyri.

Hóast tú vart barn, standa nakrar upplivingar enn livandi fyri tær. Einaferð minnist eg, at foreldur míni lögdu meg í koyggjuna umborð á Tjaldrinum, og pápi fylgdi mammu heim aftur har hon helt til í Havn, tí hon skuldi ikki suður við. Nær tað hevur verið minnist eg ikki, men tað kann hava verið í 1938, tá hon skuldi til Danmarkar við skúlabörnunum. Bæði foreldur míni vóru lærarir í Vági.

Fyrst eg minnist var Eystara Bryggja í Havn spildurnýggj, ikki meira enn eini sex ella átta ára gomul. Molin var ikki meira enn 100 metrar langur, og atløgubryggjan, sum var úr træ, var ikki stórt meira enn helvtina av Molanum. Frá Molanum og inneftir mundi atløgubryggjan vera einar 100 ella 150 metrar. So var tað koyrikaiin undir Krákusteini og húsunum í Trøð um Bursatanga inn á Kongabrúnna.

Tað er her ætlanin er at byggja nýtt Tinghús, hví ikki tað? Tíðin man vera komin til at skifta út hasa hálvtannaðhundrað ára gomlu kroysina á Tinghúsvegnum, so vit fáa eitt virðiligt og prýðiligt parlament. Eitt sindur undarligt er tað, at Tórshavnar Kommuna skal keypa gomlu ognirnar, sum Løgtingið ikki kann brúka. Tørvar kommununi húsarúm, átti hon heldur at bygt eitt nútímans ráðhús.

Eina aðru ferð, vit soleiðis ferðaðust til Suðuroyar, minnist eg, vóru vit í Kollafirði, og Tjaldrið legði at inni á Langasandi, har sildaverksmiðjan var. Tá var tað ein smádrongu, ið argaði ein av lossingamonnunum. Hann hevði tikið troyggjuna hjá honum, og rann undan, og maðurin aftaná. Teir runnu leingi í runding, minnist eg. Hvör drongurin var veit eg ikki, men maðurin var Martinius í Kollafirði, varð mær sagt. Nógvar søgur ganga um Martinius í Kollafirði, men hetta er tað eg veit einastu ferð eg havi sætt hann.

Longu tá var stórt virksemi á Kollafirði, og tá ein kontainarahavn nú verður gjørd við fjørðin, er tað ikki annað enn eitt natturligt lið í menningini av samfelagnum, ikki minst nú havnir verða fluttar, tí ov trongligt er at koma til og frá við nógvum farmi á teimum stóru plássunum.

Einaferð vit vóru við Tjaldrinum og lógu á Tvöroyri, sóu vit eitt flogfar, tað kann hava verið í 1934. Tað var ikki vanligt at síggja flogför í tríatiárunum, fleiri ár fyri kríggi, so tit kunnu ætla, at tað var ein stór uppliving. Eg minnist so væl, at vit stóðu frammi á skipinum og hugdu, meðan flogfarið sveimaði yvir fjörðinum og býnum. Um flogfarið setti seg á fjörðin, minnist eg ikki, men tað er ikki óhugsandi, tí í tríatiárunum veit eg at flogför settu seg bæði í Havn og í Vági.

Nú vit eru við Tvøroyri, rennur einum í hug tær politisku hugsjónir, ið merktu serstakliga hetta bygdasamfelagið, og hvat tey fólk, sum her gingu undan, høvdu sagt um tann politikk fólkini, ið komu aftaná føra.

Og so saltsiloin á Drelnesi sum seinastu árini hevur verið talað og skriva so nógv um. Vónandi eydnast tað at varveita húsið, tí tað sum Eiffeltornið er fyri Paris og Frælsisgudinnan fyri New York er saltsiloin á Drelnesi fyri nógvar suðroyingar.

Nú verður fyrisitingin hjá Strandfaraskipum Landsins flutt suður á Tvøroyri, og tað er at vóna at hetta almannatiltakið hjá landsstýrinum fer at eydnast og bera frukt.

Men nú verður jóansøka, og tann sum vitjar á Tvøroyri á stevnuni, gloymir tað seint, tí teir eru bæði blíðir og stuttligir har suðuri.

Tað tók, sum vera mann, sína tíð at koma suður til Vágs, tá tú skuldi bíða á Tvöroyri meginpartin av einum degi ella so, men hetta var so mikið góður fartur í mun til regluligu innanoyggjasiglingina, at nógv tóku Tjaldrið framum. Av Tvøroyri fór Tjaldrið suður á Vág, og hvat er, fyri ein ið er barnvaksin í Vági, størstu bygd í Suðuroy, meiri hugtakandi enn at sigla Vágsfjørð, fólkaríkasta fjørðin í oynni, ein góðveðursdag á heysti. Koma aftur á gamlar steinar, síggja tey kendu støðini, ta blíðu náttúrina, og grønu fjøllini vallaði upp á toppin, skipini á fjørðinum og tann nýslidna bøin.

Tórshavn á jóansøku 2007



*Fiskaarbeiði á Tvøroyri í tríatiárunum* Fornminnissavnið eigur myndina (8186F45)



*Tjaldrið við kaj í Vági fyri 1935* Myndina eigur Fornminnissavnið (6793F17)